# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 29.03.2016 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Anna Brattaberg Samuelsen
Conrad Gaard Joensen
Dánjal Bjarkhamar
Heri Hjelm
Poul W. Augustinussen
Eyðbritt Krosslá

Ikki møtt: Tórður Poulsen, fráboðað

Nevndarskrivari: Petry Joensen



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 16/16 | 15/00270-2 | Nýggj tannlæknaskipan | 3 |
| 17/16 | 16/00016-3 | Matr 1f, neystagrund, nýggjur leigusáttmáli | 4 |
| 18/16 | 16/00041-3 | Leigusáttmáli við Botnhaga | 4 |
| 19/16 | 16/00049-2 | Gerða gøtu fram við sմáttunum við Laksá | 5 |
| 20/16 | 16/00059-3 | Mannagongd viðv. setanum í Musikkskúlanum í Suðuroy | 6 |
| 21/16 | 16/00075-3 | Umsókn um stuðul fyri árið 2016_Johanna TG326 | 6 |
| 22/16 | 16/00080-3 | Uppskot um at broyta talið av kommunustýrislimum í Vágs býráð frá 9 til 7 | 7 |
| 23/16 | 16/00057-2 | Uppskot um at broyta mannagongd viðv. skuld til Vágs Havn | 7 |
| 24/16 | 16/00089-4 | Umsókn frá Grunninum Páls Høll | 8 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25/16 | 16/00091-2 | Arbeiðstíðin hjá leiðaranum Suðuroyar barnaverndartænastu. | 8 |

## 16/16 Nýggj tannlæknaskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.11.2015 | 60/15 | 15/00270-2 |
| 2 Vágs Býráð | 30.11.2015 | 29/15 | 15/00270-2 |
| 3 Sosiala nevnd | 15.02.2016 | 3/16 | 15/00270-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 35/16 | 15/00270-2 |
| 5 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 16/16 | 15/00270-2 |

Verandi tannlækni fer frá fyri aldur 7. desember 2015.
Kommunan hevur í eitt tíðarskeið verði í samband við privata tannlæknan á staðnum um at yvirtaka uppgávuna, og veita teimum skúlabørnum sum í dag eri í skúlatannlæknaskipanini í Vági tænastuna eftir at skúlatannlæknin fer frá vegna aldur.
Hetta er hon sera sinna fyri, men bíða hevur verði eftir einum sáttmála sum kommunufelagið og tannlæknafelagið hevur arbeitt við. Hetta arbeiðið er ikki komið heilt á mál enn, men eitt fyribils uppskot fyriliggur.
Á seinasta fundi vísti tannlæknin á, at tað fyrsta árið verður møguligt eyka arbeiðið og kundi hon hugsa sær eitt ávíst + gjald fyri at dekka upp fyri hesum, bæði tað digitala arbeiðið sum skal gerast við at fáa øll børnini inn í teirra skipan, men eisini um okkurt serligt er at gera út yvir tað vanligu røktina.

**11. februar 2016:**
Umsitingin ynskir at kunnað Sosialu nevnd um tað arbeiðið Kommunufelagið hevur gjørt higartil viðv. at fáa eina avtalu við tannlæknafelagið og sertannlæknan.

**10. mars 2016:**
Tað er ikki eydnast kommunufelagnum, tannlæknafelagnum og sertannlæknanum at koma til nakra endaliga niðurstøðu/semju.
Umsitingin hevur nú saman við Rudie Thomsen gjørt uppskot til sáttmála vegna barnatannarøkt fyri 2016. Samlaði kostnaðurin pr. barn verður fyrsta árið 3.150,00 kr.. Rudie Thomsen hevur gjørt avtalu við sertannlæknan Halldis á Grønastøð um ortodonti, og kemur hon á vitjan áleið 6 ferðir árliga.
Uppskot til sáttmála verður sostatt lagt fyri til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin 23. november 2015:**
Einmælt samtykt, at Vágs kommuna ynskir at grunda avtaluna við privata tannlæknan í tráð við tað avtaluna sum Kommunufelgið er í gongd við at gera við tannlæknafelagið.
Um serligar støður íkoma eiga kommunan og privati tannlæknin at loysa hetta sínámillum.

**Vágs Býráð 30. november 2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Sosiala nevnd 15. februar 2016:**
Kunnað. Umsitingin tekur kontakt til sertannlæknan sum skjótast. Og royna at fáa hetta upp at koyra sum skjótast.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við sáttmálanum. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt, at taka undir við hesum.

## 17/16 Matr 1f, neystagrund, nýggjur leigusáttmáli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 15.02.2016 | 4/16 | 16/00016-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 32/16 | 16/00016-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 17/16 | 16/00016-3 |

Henning Joensen hevur ringt til Suna Poulsen, og boðað frá at Martin Mikkelsen vil yvirtaka hansara leigumál.

Uppskot til leigusáttmála er viðheft og skrivað eins og teir síðstu sáttmálarnar, ið eru góðkendur til neystagrundir (td Elian Hansen og Arni Midjord).

**Havnanevndin 15. februar 2016:**
Havnanendin tekur undir við at nýggjur leigari yvurtekur leigumálið, men neystagrundin eigur at verða ruddað áðrenn skifti fer fram, vístandi til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at Martin Mikkelsen fær leigusáttmála. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt.

## 18/16 Leigusáttmáli við Botnhaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.02.2016 | 8/16 | 16/00041-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 34/16 | 16/00041-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 18/16 | 16/00041-3 |

Vágs kommuna hevur í juli 2015 undirskriva avtalu/sáttmála við formannin í Botnhaga sum ásetur at kommunan skal gjalda Botnhaga 10.000 kr. í árligari leigu fyri vatnbrunnin á Hálsinum. Hetta frá 1. januar 2016.
Formaðurin fyri Botnhaga hevur vent sær til fíggjarleiðarin og víst á, at kommuna hevur goldið teimum 5.000 kr. fyri 2014, sambært honum eiga teir 5.000 kr. fyri 2015 og 10.000 kr. fyri 2016.

Allar avtalur/sáttmálar eiga at viðgerast í avvarðandi nevnd, sum síðan leggur tilmælið fyri fíggjarnevndina um avtalan er styttri enn 5 ár, er avtalan longri enn 5 ár skal hetta leggjast fyri býráðið.

**10. mars 2016:**
Umsitingin hevur við útgangsstøði í avtaluni gjørd í 2015, gjørt uppskot til sáttmála sum verður lagdur fyri fíggjarnevndina og síðani býráðið til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 15. februar 2016:**
Tekniska nevnd staðfesti avtaluna sum er gjørd við hagastýri.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at gjalda kr 10.000 íalt um árið til Botnhaga. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt.

## 19/16 Gerða gøtu fram við smáttunum við Laksá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.02.2016 | 11/16 | 16/00049-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 37/16 | 16/00049-2 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 19/16 | 16/00049-2 |
| 4 Vágs Býráð | | | 16/00049-2 |

Uppskot er komið frá Dennis Holm at kommunan skal gera gøtuna fram við smáttunum við Laksá. Gøtan verður umleið 80 m long. Harumframt er skotið upp at V.K. keypir útilampur til húsini, ímóti at kommunan ikki skal veita annan form fyri útiljós til økið. Tekur tekniska nevnd undir uppskotunum.

**10. mars 2016:**
Tekniska nevnd umrøddi á fundi 7. mars 2016 Íløgu – Ætlan fyri 2016. Tekniska nevnd mælir til at fylgja viðfestu ætlan við fylgjandi viðmerkingum:

- Hyttur við Laksá: sum útgreinað, men eykajáttan má fáast til hetta endamálið. Neyðugt er við eini eykajáttan til nevnda endamál. Gøtan kostar kr. 50.000 og parkeringsplássið eystanfyri Kráaveg kostar kr. 50.000 Tekniska nevnd legði dent á at øll loyvir eiga at verða upp á pláss, skrifligt, áðrenn parkerinsplássið verður gjørt.

**Tekniska nevnd 15. februar 2016:**
Málið má lýsast betri á næsta fundi í samgonguni. Limirnir í teknisku nevnd undrast á at bert eitt hús hevur goldið sín part til Vágs kommunu enn, og ynskja ein útgreining í málinum.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at biðja Býráðið um at játtað eykajáttan á kr. 100.000. Øll neyðug loyvir skulu fáast til vega áðrenn parkeringsplássið verður gjørt.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Samtykt við 7 atkvøður fyri at játta 100.000,00 kr. sum eykajáttan til arbeiðið. Heri Hjelm atkvøddi blankt. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

## 20/16 Mannagongd viðv. setanum í Musikkskúlanum í Suðuroy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.03.2016 | 26/16 | 16/00059-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 31/16 | 16/00059-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 20/16 | 16/00059-3 |

Umboðsmaðurin hevur sent álit viðv. mannagongd av setanum av musikkskúlanum í Suðuroy.

**Mentanarnevndin 07. marts 2016:**
MN beinir málið í býráðið, og mælir til at setanartilgongdin verður gjørd av nýggjum. Eisini hevði verið hóskandi at umboðið hjá Vágs Kommunu, Sólrun Mohr, bleiv spurd um hesa tilgongd.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka niðurstøðuna frá Umboðsmanninum til eftirtektar. Kommunan vendir sær til Mentamálaráðið, og kannar um og nær lógin verður broytt.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini. Málið verður tikið upp á fyrst komandi fundi eftir at Vágs kommuna hevur frætt aftur frá Mentamálaráðnum.

## 21/16 Umsókn um stuðul fyri árið 2016_Johanna TG326

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.03.2016 | 30/16 | 16/00075-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 29/16 | 16/00075-3 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 21/16 | 16/00075-3 |

Vágs kommuna hevur 3. mars 2016 móttikið umsókn um stuðul fyri fíggjarárið 2016 frá nevndini handan sluppina Johannu TG326.
Við umsóknini er innsent roknskapur fyri 2015.

**Mentanarnevndin 07. marts 2016:**
MN stuðlar við 60.000,- kr. Til Johannu TG326. og beinir málið í FN

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at játtað kr. 60.000. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt.

## 22/16 Uppskot um at broyta talið av kommunustýrislimum í Vágs býráð frá 9 til 7

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 36/16 | 16/00080-3 |
| 2 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 22/16 | 16/00080-3 |

Conrad Gaard Joensen hevur umvegis teldupost dagfestur 10. mars 2016 sent áheitan um, at fáa tikið upp til viðgerðar á komandi býráðsfundi soljóðandi:

Uppskotið er at lækka talið av býráðslimum úr 9 limum niður 7.
Hetta er fyri tað fyrsta ein økonomiskur fyrimunur.
Við 7 limum er eisini størri møguleiki fyri at allir limir í býráðnum fáa sæti í nevndum og undirnevndum og við hesum styrkja um samarbeiði og samanhaldi.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at mæla frá at broyta verandi tal av Býráðslimum. Málið verður beint í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Atkvøtt bleiv um uppskotið frá Conrad Gaard Joensen. Uppskotið fall.
Heri Hjelm og Conrad Gaard Joensen atkvøddi fyri, restin av møttum býráðslimum atkvøddi ímóti at broyta talið av býráðslimum.

## 23/16 Uppskot um at broyta mannagongd viðv. skuld til Vágs Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2016 | 22/16 | 16/00057-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2016 | 25/16 | 16/00057-2 |
| 3 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 23/16 | 16/00057-2 |

Fíggjarleiðarin vísir á, at samtyktirnar og mannagongdirnar viðv. skuld hjá feløgum og skipum við Vágs Havn eru truplar at umsita. Skipanin leggur partvíst upp til, at feløgini spekulera í, bert at gjalda niður um markið fyri streym, meðan øll onnur skuld hækkar.

Fíggjarleiðarin ynskir at Fíggjarnevndin tekur málið upp og einklari reglar verða gjørdar fyri skuldarmarkið, og nær tænastan frá kommununi steðgar/heldur uppat.

Kanska leggja upp til at øll skuldin (yvir tíð) minkar?

Eisini eigur at havast í huga, at tað oftani eru somu persónar sum standa aftanfyri fleiri feløg, sum hvørt sær hevur eina stóra skuld.

**2. mars 2016:**
Umsitingin hevur nú kannað eftir hvussu hetta er skipað í Runavíkar-, Tvøroyrar- og Vestmanna kommunu (sí viðfest).

**Fíggjarnevndin 22. februar 2016:**
Einmælt samtykt at umsitingin kannar eftir hvussu hetta er skipað í øðrum kommunum. Og leggur málið fyri aftur á komandi.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2016:**
Einmælt samtykt at beina málið í Býráðið.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Býráðið er av teirri fatan at hesar mannagongdir eiga at verða stramma eitt sindur upp, eitt nú kallað inn til fundar um eingin rørsla eri í saldo (minkandi saldo) í 3 mánaðir. Samskifti verður skrásett í journal.

## 24/16 Umsókn frá Grunninum Páls Høll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 24/16 | 16/00089-4 |

John Henrik Holm frá Grunninum Páls Høll var mánadagin á fundi við m.a. fíggjarnevndina og greiddi frá ætlan um útbygging av Páls Høll.
Og í hesum sambandi hevur hann sent umsókn um stuðul. Sí viðheft.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Dennis Holm var ikki við í viðgerðini metti seg ógegnigan.
Samtykt við 6 atkvøðum fyri, at hækka leigusáttmálan við 375.000,00 kr., soleiðis at hendan verkætlanin kann gerast til veruleika. Conrad Gaard Joensen atkvøddi ikki.

## 25/16 Arbeiðstíðin hjá leiðaranum Suðuroyar barnaverndartænastu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 29.03.2016 | 25/16 | 16/00091-2 |

Arbeiðstíðin frá hálva tíð til fulla tíð hjá leiðaranum í barnaverndartænastuni.

**Vágs Býráð 29. marts 2016:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum. Vágs kommuna hevur alla tíðin ført fram at leigarin átti at verða settur fulla tíð. Vágs kommuna ynskir somuleiðis at vísa á, at man ynskir ikki at hetta viðførir at tænastustøði lækkar.
Víst verður eisini á, at hetta krevur at viðtøkurnar verða broyttar.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Anna Brattaberg Samuelsen |
| Conrad Gaard Joensen | Dánjal Bjarkhamar | Heri Hjelm |
| Poul W. Augustinussen | Tórður Poulsen | Eyðbritt Krosslá |